

# Stjørna í eitt kvøld

**Hvør fer so at vinna hesuferð? Á tí fáa vit ikki svar fyrr enn í desembur, tá tann stóra finalan verður.**

Fríggjadagin tann 5. septembur verður ein av størstu donsku undirhaldssendingum nakrantíð aftur sjósett - tann væl dámda sangkappingin Stjerne for en aften. Hendan sendingin er ein upptakt til frumsendingina av sjálvari sangkappingini, ið byrjar 12. septembur. Her fær hyggjarin møguleikan at síggja brot frá upptøkunum av luttakarunum til í ár, eisini koma nummar eitt, tvey og trý frá í fjør í sjónvarpshølið og Guðrun Sólja Jacobsen og Jacob spæla løg av teirra nýggju útgávum. Og so er eisini eitt pláss eftir til eina stjørnu afturat í sangkappingini. Longu fríggjakvøldið kann hyggjarin so avgera, hvør verður tann hepni verður, ið fær møguleikan við at senda sms ella ringja.

Verturin er tann sami sum hini bæði árini, Natasja Crone. Hon er eftir hondini blivið eitt kent andlit á DR rásini. Hon hevur verið vertur á sendingunum frá OL, Tour de France og Altjóða Melodi Grand Prixnum. Hon er útbúgvin journalist og sær bara heilt fitt út í einum galakjóla. Tónleikabólkurin, ið skal stuðla luttakarunum í teirra sangi, verður aftur í ár leiddur av kapelmeistaranum Joakim Pedersen og hansara All Stars bólki.

Tá sangtalentini skulu royna seg, eru karmarnir fyri ein stóran part sniðgivnir av danska sniðgevarafelagnum1508. Í samstarvi við

### Bólkurin

| | |
|---|---|
| Emil De Waal: | Trummur |
| S.P. (Henrik): | Stetoskopbass |
| Jonas Krag: | Gittar |
| Gustaf Ljunggren: | Gittar/steel-gittar |
| Joakim Pedersen: | Ljómborð o.l. |
| *(kapelmeistarin)* | |



framleiðslufelagið BLU standa hesir fyri tí sjónliga á sjónvarpsskíggjanum og á heimasíðuni. Hetta vil siga innleiðingin til sendingina, allar grafiskar yvirgangir, stórskíggja-grafikkin til pall í sjónvarpshølunum og so heimasíðuna.

Í fjør var, sum øll vita væl, Guðrun Sólja Jacobsen vinnarin. Jens Marni Hansen hevur megnað at komið við í ár. Spurningurin er, um hvussu langt hann fer at røkka. Yvir 2000 persónar sendu upptøku við sær til kappingina Stjørna í eitt kvøld og Jens Marni var so ein av teimum, sum blivu vald út. Í síni upptøku sang hann sangin Desperado hjá bólkinum The Eagles.

